# Bók um túsund føroyskar kvinnur



*Bókin hjá sjúkrarøktarfrøðingunum varð løgd fram í gjár. Í miðjuni sæst fráfarandi forkvinnan, Jana H. Dalsgaard*

**Í gjár varð bókin um føroyskar sjúkrarøktarfrøðingar løgd fram fyri almenningin í felagshúsunum í Lucas Debesargøtu í Havn**

*Orð og myndir : Dánjal P. Højgaard*

Kvinnudagin 8. mars kom út ein bók um 1000 føroyskar kvinnur frá 1912-2007 – og nakrar mans eisini. Bókin varð løgd fram fyri almenningin í gjár seinnapartin, tá móttøka var í húsunum hjá føroysku sjúkrarøktarfrøðingunum seinnapartin. Væl av fólki møtti upp til hátíðarhaldið har Jana H. Dalsgaard, forkvinna, beyð vælkomin og segði nøkur orð um arbeiðið við bókini.

Nevndin í felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar samtykti at fara undir bókaverkið fyri seks árum síðani. Arbeitt hevur verið eftir líknandi leisti, sum við bókini um føroyskar lærarar. Men tað hevur eisini staðið teimum, ið hava svarað, frítt at taka við ymsar upplýsningar av týdningi. Hetta ger bókina fjølbroytta og áhugaverda at lesa. Spurnarbløð eru send út til so nógvar føroyskar sjúkrasystrar ella og - røktarfrøðingar sum gjørligt, umframt at lýst hevur verið í bløðum bæði her heima og uttanlands. Bókin er við hesum ein byrjan at lýsa hendan partin af føroyskari kvinnusøgu.

Hugtakandi er at síggja, hvussu víða føroyskar sjúkrasystrar hava verið. Tær hava røktað og grøtt fólk um allan heim; í friðartíð eins og í kríggi.

Nakrar vóru til dømis í Týsklandi undir seinna Heimsbardaga, onkur í Finsk-Russiska krígnum o.s.fr. Men størsti parturin av arbeiði teirra hevur tó verið her heima á klettunum.

Tær vóru ofta við til at taka ímóti teimum nýføddu, røktaðu tey sjúku og skaddu, sótu við sóttarsong – og sveipaðu tey deyðu í seinasta búnan. Ein fakligur bólkur, ið eitt samfelag ikki kann vera fyri uttan. Tí er tað gleðiligt og sømiligt, at skjøtil nú endiliga er settur á at lýsa lív og lagnur hjá føroyskum sjúkrarøktarfrøðingum.

Bókin er prentað á Føroyaprent og kemur í bókabúðirnar í næstum. Niels JákupThomsen, Marna Jacobsen og Turid Kjølbro frá Bókadeild Føroya Lærarafelags hava ritstjórnað. Staðið fyri innsavning av tilfari fyri felagið hava Hansa Christiansen, Hervør Eidesgaard og Jana H. Dalsgaard.







*rá móttøkuni í gjár í hølunum hjá sjúkrarøktarfelagnum*

# Signar P. Dam 70 ár



Mikudagin tann 7. mars fylti pápi okkara 70 ár. Henda dagin var hann burturstaddur.

Sum 70 áringur, halda vit, at hann sær sera gott út og heldur seg stak væl.

Pabba er sonur Ragnhild og Petur M. Dam og vaks upp á Tvøroyri.

Eftir lokið studentaskúlaprógv í Hoydølum, fór hann at mála saman við góða vini sínum og systkinabarni Tummas Michael Smith. Síðani fóru hann og mamma til Danmarkar, har hann tók útbúgving sum lækni. Eftir 13 ár í Danmark, longdust teimum heima aftur til Føroyar, og í 1971 fluttu tey til Tvøroyrar at búgva við okkum trimum børnum. Pabba hevur altíð verið ógvuliga lokalpatriotiskur og áhugamál sum hava við Tvøroyri at gera, liggja honum tætt at hjartanum.

Tey fyrstu nógvu árini, var pabba sera virkin sum reiðari og kommunalpolitikkari.

Hann hevur starvast sum kommunulækni í skjótt 35 ár og eydnan var við honum, tá ið hann fekk Karl Johan Fossá sum starvsfelaga, har teir báðir saman við skrivarunum Almu og Dianu, hava havt eitt ómetaliga gott samstarv við nógvum stuttligum løtum.

Matgerð er eitt av heilt stóru áhugamálunum hjá pabba. Honum dámar sera væl at borðreiða við nøkrum heilt serligum og alt er so gjøgnumført hjá honum. Hann og vinkonan Anna Kirstin hava fleiri ferð gjørt tað stóra kalda borðið til veitslur, har tað hevur smakkað so væl og sæð so gott út, at fólk hava tosað um tað leingi aftaná.

Tá ið familjan er samlað og pabba hevur gjørt mat, eru vit altíð so spent, tí vit vita, at alt hann ger, smakkar so ævintýrliga væl.

Á henda hátt hevur hann altíð dámað væl at samla okkum til ein góðan bita.

Anders And uppvaskið í køkinum aftaná er ein onnur søga - vit fáa í hvussu so er eitt gott og laaaaangt prát, tá ið uppvaskið verður tikið.

Heilt frá barnsbeini av hevur honum dámað at lurta eftir opera og klassiskum tónleiki. Til tíðir eru hátalararnir vendir út móti bønum og vindeyguni standa víðopin, meðan hann rokast uttanfyri við ymsum. So ýlir hetta - fyri okkum ljóðandi - hysteriska kvinnumenniskja um allar geilar. Lukkutíð fyri tvøráfólk, hevur hann nú ognað sær ein MP3 spælara.

Pabba! Nógv góð orð kunnu vit siga um teg, men tað týdningarmiklasta tú hevur givið okkum er kærleika og tryggleika. Og hóast tú hevur lagt oyra til nógvar søgur ígjøgnum títt arbeiði sum lækni, so leggur tú altíð oyra til, hvat vit hava á hjarta og ráðini frá tær eru altíð merkt av umhugsni og klókskapi.

Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum og ynskja tær alla góða eydnu framyvir. Vit elska og virða teg ómetaliga høgt.

Kærar heilsur Malla, Ragnar og Pætur

PS Vit gleða okkum øll nógv til Italien túrin í summar.